


**Nr. 23** ***8. november 2026*** **86. árg.**

# Livir Jesus í dag?

*Asbjørn Kvalbein*

**Livir Jesus í dag, og er hann mær nær?** Hesar spurningar ivist eg ikki í eftir at hava lisið vitnisburðin hjá Bachtiar úr Kazakhstan. Hann var føddur muslimur, men vendi um til Jesus og gjørdist kristin.

Muslimarnir tóku hann og bundu hendur hansara aftan bak við einum togenda. Teir spurdu hann, hvussu nógvan pening teir kristnu høvdu lovað honum, um hann vendi við til Jesus. Bachtiar var tigandi og segði ikki eitt orð, men hetta gjørdi teir bara enn óðari.

So at enda segði Bachtiar: „Eg havi ongan svikið. Eg tók bara ímóti innbjóðingini frá Gudi, sum segði: „Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, fyri at hvør tann, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív.“ Sonur Guds er Jesus, og honum havi eg tikið ímóti.“

Hetta østi mannamúgvuna upp. Bachtiar hugdi rundan um seg eftir einum vegi at sleppa til rýmingar. Men fólkahópurin stóð tætt stúgvaður rundan um hann, tað var ógjørligt.

Bachtiar fyrireikaði seg at doyggja, og hann fór at biðja: „Harri, fyrigev mær allar syndir mínar, og fyrigev hesari mannamúgvuni hennara syndir.“ Tá hoyrdi hann eina rødd, sum segði: „Ver ikki bangin, eg eri við tær!“

Hann snaraði sær á, men har var eingin, sum kundi havt sagt hasi orðini. Fólkahópurin fór nú at rópa og kjakast sínámillum. Summi vildu, at Bachtiar skuldi førast fyri rættin, meðan onnur róptu, at hann skuldi drepast á staðnum nú beinanvegin. Summi róptu, at hann skuldi heingjast, meðan onnur róptu, at hann skuldi steinast.

Tá alt í einum merkti Bachtiar, at reipið um hendur hansara loysnaði. Hann hoyrdi eina rødd, sum segði: „Tú er fríur. Far avstað.“

Bachtiar fór róliga til gongu, og eingin gav sær far um tað, tí tey klandraðust sínámillum. Hann fór beina leið yvir til Aleksander prest, sum var ovasti fyri Luthersku Missónini har á staðnum, og teir vóru sannførdir um, at Gud hevði gjørt eitt undur.

Men einar tveir dagar seinni sá Bachtiar, at Gud ikki bara hevði gjørt eitt undur, hann hevði gjørt tvey, tí tá hendi tað, at nakrir mans bankaðu á dyrnar. Bachtiar fór út og visti ikki, hvat ið hann kundi vænta sær. Men menninir bóðu um fyrigeving fyri tað, sum teir høvdu gjørt móti honum, og nú vildu teir gerast kristnir sum hann.

**Gud er undurfullur. Hann livir og er sera nær. Tað vísir frásøgnin um Bachtiar.**

*Effie Campbell.*

# Tú, sum gongur í ljósinum

*„Tú, sum gongur í ljósinum, skuldi bara vitað,*
*hvussu tað er at vera í myrkrinum...!“*

Soleiðis sang hin blindi biddarin, sum kom inn í bussin í dag, og tá ið hann fekk nøkur oyru, takkaði hann við orðunum: „Gud varðveiti teg frá at gerast blind!“

Sangurin hjá hesum blinda legði brádliga ein skugga yvir ferðafólkini í bussinum, hetta var eitt neyðarróp úr tí djúpasta myrkrinum, eitt máttloysi so stórt, eitt vónleyst suff...!“ Men hvat kundu ferðafólkini í bussinum gera við tað?

Skjótt gelti popptónleikurin frá bandupptakaranum gjøgnum bussin, hin blindi og hansara neyðarróp var aftur gloymt, hann mátti sanniliga taka til takkar við smápengarnar og tað, at fólk bara høvdu áhuga fyri honum eina løtu. Fólk høvdu jú annað at hugsa um, og bussurin koyrdi víðari!

Eftir sat eg í djúpum hugsanum – var hesin blindi og hansara sangur ein serlig heilsan til **mín**? Eitt neyðarróp um **ikki** at svíkja? Ein áminning um, at har millum teir fátæku biddararnar á gøtuni møta vit tí persónifiseraða Frelsaranum, sum rættir sína tómu hond út ímóti okkum, sum hava hendurnar fullar av so nógvum fullkomiliga týdningarleysum tingum? Frelsarin kallar, okkara næsti kallar – og hvat er **okkara** svar?

„Gud varðveiti teg frá at gerast blind!“ Ja, hetta er ikki bara ein gudsóttandi bøn frá einum av teimum blindu biddarunum á gøtuni, men hetta má vera hin dagliga bønin hjá øllum kristnum menniskjum – ikki at vera blindur, men síggja møguleikarnar nú og í dag og biðja um styrki og kærleika at grípa um teir – í Jesu navni!

*L.M.F.-blaðið – Effie Campbell* umsetti.

# Altargongd í Kina

Í Kina búgva 950 milliónir menniskju, so fjórða hvørt fólk á jørð er ein kinesari. Harrin má hava verið serliga góður við teir, tí hevur hann gjørt so nógvar av teimum. Ongar kirkjur eru í Kina. Kortini vita vit, at tað eru kristin har; men verða tey uppdagað, blíva tey dripin beinanvegin.

Ein kristin fór til býin Shanghai. Hetta er størsti býur í Kina, kanska størsti býur í heiminum. Har eydnaðist tað honum sanniliga at koma í samband við ta undirjørðisku kirkjuna. Soleiðis kallast tey kristnu, sum samlast í loynd.

Presturin har var 103 ára gamal! Hann fór ikki frá við eftirløn, tá ið hann var 67 ella 70 ár. Eingin var at gjalda honum eftirløn, og tá ið hann so var 100 ár, kundi hann líka so væl halda á at verða prestur og hirði fyri sínari meinigheit.

Í Kina eru ongar Bíbliur. Tá tað hendir, at ein verður smuglað inn, verður hon skrødd sundur í petti, so ein fær Matteusar Evangeliið, ein annar 1. Mósebók, ein triði Opinberingina o.s.fr. Hesin prestur hevði fingið Ápostlasøguna, og hann helt eina prædiku fyri og aðra eftir ár undan ári úr Ápostlasøguni.

Tá ið tey fóru til altars og skuldu samlast um breyðbrótingina, var einki breyð at bróta, tí í Kina er einki breyð. So brúkti presturin rís í staðin fyri. Tá ið hann breyt tað og gav teimum tað, var tað ógvuliga álvarsamt, tí tey vistu, at um tað bleiv uppdagað, tað, tey gjørdu her, so bleiv teirra egna likam brotið, og tað beinanvegin. – Vín høvdu tey heldur ikki, tí vín er ikki at finna í øllum Reyða-Kina, so nýttu tey vatn í staðin fyri.

Hesi menniskju samlaðust um borð Harrans undir trongum umstøðum. Teirra lív kundu koma at liggja á. Hvussu er við okkum? Fara vit fús eftir boðum Harrans til altars? Hann hevur sjálvur sagt: „Tann, sum etur hold mítt og drekkur blóð mítt, hevur ævigt lív, og eg skal reisa hann upp á evsta degi.“ Jóh. 6,54.

*Effie Campbell.*

# Kongur yvir náttúruni

Jesus er eisini kongur yvir náttúrukreftunum. Hann róði á Genesaret vatninum við lærusveinum sínum. Satt ódnarveður brast á, vindurin ýldi, toran gekk, og snarljósini skygdu, og aldurnar brutu. Men hann svav. Lærusveinarnir gjørdust hjartkiptir, og teir vaktu hann, og hann reistist og stendur uppi í bátinum. Sært tú hann fyri tær?

Snarljósini skyggja á himlinum, toruslátturin buldrar millum Golanheyggjarnar og Gileadsfjøllini. Stormurin kemur ýlandi oman av sýrisku háslættunum og pískar sjógvin upp. Tá fer hann á føtur. Klæðini flákra, og kyrtilin smellir. Hárið stendur í andarisi. So hóttir hann at vindinum og talar við aldurnar: „Tigið, verið kvirrar!“

Tá falla aldurnar saman, vindurin doyr burtur, og tað gerst blikalogn. Á enskum stendur: „There was a great calm,“ tað merkir „har gjørdist stór kvirra.“ Tá kemur ein lærusveinur fyri og annar eftir og fellir honum til kníggja í bátinum. Pætur, Jóhannes, Jákup, Andrias og allir hinir, og teir søgdu: „Sanniliga, tú ert sonur Guds.“

Hann er Kongur yvir náttúrukreftunum. Hann talaði enntá á eitt fikutræ og bannaði tað til deyðis. Og træið doyði beinanvegin, tí Jesus er Kongur yvir náttúruni.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tær vælsignaðu hendurnar á mammu

Christian Scriver greiðir frá, at mamma hansara hvørt kvøld, eftir at hon hevði biðið við honum, legði hond sína á høvd hansara og vælsignaði hann.

Seinni í lívinum, tá ið freistingarnar komu, var tað altíð, sum føldi hann hondina á mammu síni á høvdi sínum, og hann fekk styrki at siga við seg sjálvan: „Ger ikki Frelsara tínum sorg og mammu tíni skomm.“

*Effie Campbell* umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 8. nov. | **Tekstur:** | Matt. 28,18–20; Mark. 10,13–16; 1 Pæt. 1,3 | **Bíbliuorð:** | Mark. 16,16a |
| 15. nov. | **Tekstur:** | Matt. 26,26–29 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 6,48 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 24** | ***22. november 2026*** | **86. árg.**

# Tríggjar feitar rottur

Undir 2. veraldarbardaga førdu amerikumenn og japanar loftkríggj móti hvør øðrum. Ein amerikanskur flogskipari sá bráðliga til sína ræðslu tríggjar feitar rottur niðri á dúrkinum. Tær mundu vera komnar inn í flogfarið, meðan tað hevði staðið inni í hangarinum.

Ein rotta gnagaði niður gjøgnum dúrkið. Ein onnur rotta gnagaði ein leidning, og triðja rottan gnagaði nøkur tól. Skiparin skilti, at hann fekk ikki stundir at lenda, tí rotturnar megnaðu at gnaga hol á skrokkin hvørja løtu, og tá fór flogfarið at bólta til jarðar.

Hann setti seg í samband við støðina og spurdi, hvat ið hann nú skuldi gera. Fleiri flogskiparar svaraðu honum, at har var einki at gera, hann fór at detta niður hvørja løtu. Men so svaraði ein flogskipari: „Tað er EIN útvegur, men bara EIN. Ger beinanvegin, sum eg sigi. Lat teg í iltmaskuna, hygg upp móti sólini og set kósina tann vegin!“

Tað gjørdi hann, og so sá hann, at rotturnar hildu uppat at gnaga. Tær stardu upp á hann og vinglaðu sum ein fullur maður. Tær spentu beinini út frá sær, og so bóltaðu tær rút og vóru deyðar, tí her uppi var luftin so tunn, at tær kvaldust.

Johannes Amritzer, sum í nógv ár hevur verið trúboðari í Afrika, brúkar hesa sonnu frásøgn um rotturnar, at greiða frá, at rotturnar eru sum ein mynd upp á teir illu andarnar. Jesus kann sammetast við sólina. Hann er hitt bjarta ljósið. Hann er eisini Vegurin til Himmals. Tann, sum bjóðar Jesusi inn í hjarta sum Harra og Frelsara, verður frelstur. Hann skal biðja um fyrigeving fyri allar syndir sínar og takka Jesusi fyri

frelsuna og geva honum førarasetrið. Sjálvur skal hann seta seg í sessin, ætlaður ferðafólki.

Amritzer greiddi frá, at tá ið fólk gjørdu tað, so flýddu teir illu andarnir við ferð út úr fólki, tí teir ræddust Jesus og hansara bjarta ljós. Men tá ráddi um at fylla seg við Guds Orði, sum jú er Jesus, og samlast, har orðið verður boðað reint og rætt.

*Effie Campbell.*

# Fekk persónligt bræv frá Al-Qaeda

Johannes Amritzer, sum arbeiðir sum trúboðari í Afrika, varð boðin at tala í Faisalabad í Pakistan. Tá fekk hann eitt perónligt bræv frá Al-Qaeda, og hann heldur, at hann man vera einasti persónur, sum hevur fingið tann „heiðurin"!!

Í brævinum stóð, at teir høvdu leigað ein sniðskjútta at skjóta Johannes, tá ið hann fór upp á talarastólin at boða evangeliið. Sniðskjúttin stóð uppi á einari tekju.

Hvat gert tú, tá ið tú fært eini slík boð. Ja, tú ringir ikki heim til konuna og sigur henni hetta!! Hann tók brævið og legði tað opið fram fyri Harran og spurdi, hvat ið hann skuldi gera?

Tá kom ein tanki inn í høvdið á honum: „Far út í býin og keyp tær talibanklæðir, henda fótsíða, hvíta kjólan við hatti og øllum!" Tá kom hann at líkjast einum talibani, og tískil var ikki so lætt at fáa eyga á hann. Hann fór ikki upp á talarastólin, men stóð á leikpallinum staðin fyri. Hann stóð ikki stillur, men rann sum fluga í fløsku aftur og fram í tríggjar tímar. Hann hevði verið veiðimaður fyrr og visti tí, at ringt er at sikta eftir einum hjørti, sum loypur higar og hagar. Ringt er eisini at fáa tak á einum kristnum, sum flytur seg alla tíðina og sær út, sum dansar hann salsa.

Tað er tryggari at vera á vígvøllinum enn at goyma seg heima. Dávid kongur skuldi verið á vígvøllinum, men hann sat heima við hús og hugdi at tí naknu Batsebu, meðan hon baðaði sær. Tá fall hann, og fallið var stórt.

„Al-Qaed fekk ikki rakt meg, og her standi eg 30 ár seinni. Eg gjørdi, sum skrivað stendur um Hizkia kong í 2. Kong. 19,14, eg legði brævið opið framman fyri ásjón Harrans, og tað er tað einasta rætta at gera," endaði Johannes.

Hvussu var tað so við hasum brævinum, sum Hizkia fekk? Assýriu kongur hevði skrivað, at Hizkia mátti endiliga ikki lata

seg lokka at hugsa, at Gud fór at gera tað soleiðis, at Jerusalem ikki fór at falla í hendurnar á assýriumonnum. Tá fór Hizkia niðan í tempul Harrans og legði brævið opið framman fyri Harranum, og so fór hann at biðja til Harrans. Tá sendi Harrin Jesaja profet til Hizkia við hesum boðum : „Tú hevur biðið meg um hjálp móti Sankerib, Assýriu kongi, og eg havi bønhoyrt teg!“ (v. 20). Somu nátt fór eingil Harrans út og jarðlegði í herbúðum Assýriu kongs 185.000 mans, og morgunin eftir lógu teir allir lík. (v. 35).

Um tú onkuntíð kennir tað so, at menniskju hava stongt allar vegir fyri tær, tú kennir teg kringsettan, so skalt tú minnast til, at eingin kann steingja vegin upp til himmals fyri tær. Bið!!! Men gloym so ikki at takka Harranum fyri hjálpina, tú fært! Tí alt er av náði Harrans!!!

*Effie Campbell.*

# Tá ið menniskju trýsta teg niður

Eitt líknilsi er um ein mann einastaðni sunnanfyri. Hann átti ein asna, og ein dagin datt asnin niður í ein brunn.

Maðurin tók eitt tog og klintraði niður í brunnin, bant togið um asnan og royndi at toga asnan upp. Men tað bar ikki til. Hann royndi ymiskt annað, men einki riggaði hjá honum.

So hugsaði hann, at hann fekk ikki asnan livandi upp, so tí kundi hann eins væl jarða hann har niðri í brunninum. Hann fekk sær spakan og fór undir at skumpa mold niður í brunnin. Tá ið moldin datt niður á ryggin á asnanum, risti asnin moldina av sær og trampaði á hana og dansaði uppi á henni.

Soleiðis hildu hesi bæði á, asnin og maðurin. Hvørja ferð, asnin fekk ein spaka av mold niður yvir seg, trampaði hann niður á hesa moldina. Hetta vardi í 6 tímar, men tá kundi asnin leypa upp úr brunninum. Tað, sum var ætlað at jarða hann, bjargaði honum og fekk hann at fara dansandi avstað.

Kennir tú teg trýstan niður av øðrum menniskjum, rist tað so av tær og trampa á tað. Tá kanst tú at enda fara dansandi avstað. Her í Føroyum eru ikki teir nógvu brunnarnir, men vit hava fjøllini: Ger sum vit, siga fjøllini: Legg skuggarnar niður fyri føtur tínar og reis teg upp í sólina.

*Effie Campbell.*

*Tað er eins og yvir um deyðans sund*
*alt tíðari vinirnir fara,*
*og eftir vit sita við sorg í lund*
*og sakna ein burtfluttan skara.*
*Tess longur várt æviskeið er á jørð,*
*tess vissari sorgin og tregin,*
*og vinafjøldin skjótt handan fjørð*
*gerst størri enn hesumegin.*

*Petur Háberg, eldri.*

# Hvat sløkkir sálartostan?

Tað var Moody, sum í einum av bókum sínum segði, at blakar tú ein neva av saguspønum út í tún, so er tað ikki ein fuglur, sum so mikið sum skeitir at teimum, men blakar tú ein neva av molum, so eru smáfuglarnir har beinanvegin og eta teir upp.

Tá ið vit hugsa um andaliga føði, so kennir eitt satt Guds barn munin á heimsins saguspønum og breyðinum, sum kom niður av himli, Jesus Kristus. Hansara orð er hitt einasta, sum kann sløkkja ta tystu sálina. Drekk ikki úr heimsins runuhyljum, men fyll teg við tí klára, reina kelduvatninum, sum Jesus hevur at geva tær, orð sítt.

Alt summarið á tamb eru verðslig tiltøk um vikuskiftini, ja, bæði tvey og trý ymisk eru at velja í. Men tá ið larmurin og gangurin eru tagnað, sloknar gleðin eisini, tí gleði er ikki at finna í larmi. Føroyska orðið stuttleiki sigur alt: tað er ein stuttur leikur. Nei, Jesus hevur ta ektaðu vøruna at bjóða, hann fyllir lívið við meining og innihaldi. Tá ið vit taka ímóti honum í trúgv og bjóða honum inn í okkara hjarta, so gevur hann okkum syndafyrigeving, eitt ævigt lív, frið og ta sonnu gleðina.

Hann er Vegurin, Sannleikin og Lívið. Eingin kann ogna sær alt hetta uttan at geva seg yvir til Jesus. Hann bíðar eftir tær og vil tær alt tað besta.

*Effie Campbell.*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 22. nov. | **Tekstur:** | Matt. 14,23; Jóh. 11,41–42; 17,9; Luk. 22,41–43; 23, 34 + 46 | **Bíbliuorð:** | Job. 22,27a |
| 29. nov. | **Tekstur:** | Áps. 12,1–17; Matt. 7,7–8 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,7 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74